# • SPILDURNÝTT • SPILDURNÝTT

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*



## Eitt tyssi av tannbustum

Pynta við at seta tannbustirnar í fínar vasar frá KopCup. Vasarnir eru at fáa við ymiskum mynstrum, so har er ein í part til hvønn í familjuni. Eru at finna hjá www.applicata.dk

## Við Stelton í bað

Kenda fyritøkan Stelton er nú á marknaðinum við vøkrum lutum til baðiverilsi. Røðin, sum eitur Stelton Bath og er í sjey pørtum, er úr rustfríum stáli og myrkagráum plasti við gummibotni. Fæst samlað fyri umleið 1.500 krónur ella hvør sær.





## Modernaður meksikanskur jetsett-stílur

Herligi Acapulco-stólurin er upprunaliga ein meksikanskur klassikari. Men tveir ungir danir, Kirsten Krogh og Jacob Fasting Andersen, hava nú lagað sniðið á honum til norðurlendska marknaðin. Plastiksnórarnir og stálbeinini vekja minni um avslappaðan loungestemning og litfagrar 50'ara coktailar. Stólurin kostar umleið 2.500 krónur og kann bíleggjast heim av netinum frá www.oficinakreativa.com



## Her fann hon bana sín peran

Ímynda tær, at tú ongantíð aftur skalt skifta eina brostna peru, og at hon, sum situr í lampuni, tá ið tú keypur hana, fer at lýsa í úti við 60 ár. Og at ljósið verður bæði klárari og betri enn í perunum, sum sita í lampunum í dag.
Granskarar á Cambridge University í Bretlandi kollvelta í hesum døgum hugtøkini ljósperur og spariperur. Tað nýggjasta eru bíligar og góðar ljósdiodur, sum lýsa í heili 60 ár.
Hetta ljóðar kanska ótrúligt, men verður skjótt tann rami veruleiki, skrivar The New Scientist. Colin Humprey, professari og leiðari av verkætlanini á Cambridge University roknar við, at tey hava funnið ein haldgóðan framleiðsluhátt av dioduperum innan fimm ár, og at hetta fer at hava við sær, at prísurin á dioduljósi minkar munandi. Higartil hevur høgi prísurin verið ein forðing fyri hópframleiðslu av dioduljósi. Men gongst sum ætlað, fer vanligi brúkarin skjótt at kunna keypa dioduljós fyri minni enn 20 krónur fyri hvørt.





## *Ein* løðari til allar telefonir – endiliga!

**Fyritøkurnar, sum framleiða fartelefonir, eru endiliga vorðnar samdar um, at allir løðarar til fartelefonir skulu vera eins innan ár 2012.**

**Á altjóða messuni fyri fartelefonframleiðarar, Mobile World Congress, sum var týsdagin í farnu viku, boðaðu fyritøkurnar frá, at tær framyvir fara at samstarva um at menna ein standardløðara, sum hóskar til flestu fartelefonirnar á marknaðinum innan ár 2012.**

**Millum fyritøkurnar, sum luttaka í samstarvinum, kunnu vit nevna eitt nú Nokia, Samsung og Motorola.**

**Norska blaðið VG sigur, at endamálið við avtaluni er at minka um burturkastið og um útreiðslurnar hjá teimum, sum keypa sær eina nýggja fartelefon.**

**Framleiðararnir hava í fleiri ár verið undir trýsti frá ES, sum krevur standardar á nærum øllum økjum.**

**Fyrr í vikuni segði Guenter Verheugen, ráðharri í vinnumálum hjá ES, við týskt útvarp, at tolið varð uppi, tá hann fann útav, at tað eru fleiri enn 30 ymiskir løðarar á marknaðinum í teimum 27 ES-londunum.**

• SPILDURNÝTT • SPILDURNÝTT